# Eggjar føroyskum fyritøkum til at gera íløgur í Estlandi

**Í Estlandi eru góðir møguleikar hjá vágafúsum pengum úr Føroyum, tí treytirnar eru óguvliga lagaligar og landið er ógvuliga framkomið**

VINNUMENNING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*




*– Estland er eitt ógvuliga framkomið land, men lønarlagið er lágt, skatturin lágur og vinnuliga umhvørvið yvirhøvur ógvuliga vinarligt, fortaldi Mati Murd av estlendsku sendistovuni í Danmark føroyskum vinnulívsfólki á kunnandi fundi í gjáramorgunin*

Tað eru góðir møguleikar hjá føroyskum vinnulívsfólkum at gera íløgur í Estlandi.

Tað fingu føroysk vinnulívsfólk at vita á kunnandi fundi á Hotel Hafnia í gjáramorgunin.

Tað er Menningarstovan, sum skipaði fyri hesum kunningarfundinum. Til høvið hevði hon fingið Mati Murd av sendistovuni hjá Estlandi í Keypmannahavn at koma til Føroya at greiða frá vinnuligu viðurskiftunum í heimlandinum.

### Sera áhugavert land

Menningarstovan metir, at Estland er sera áhugaverd hjá føroysku vinnuni at gera íløgur í.

Landið er sera framkomið, eisini hvat fjarskifti víðvíkur og internet er heilt vanligt og ógvuliga framkomið.

Samstundis er arbeiðsmegin ógvuliga væl útbúgvin á nógvum økjum.

– Harafturat hevur Tallinn, sum er høvuðsstað í Estlandi, eina stóra og góða havn og Tallin er sostatt vorðin fremsta portrið ímillum londini í Evropa og velduga marknaðin í Russlandi.

Kortini eru Baltalondini og Russland lond og marknaðir, sum føroysk vinnulívsfólk lítið og onki troyta og tað er hetta, sum Menningarstovan nú ætlar at broyta.

Og tey vinnulívsfólk, sum vóru komin á Hafnia at lurta, fingu tað, tey vóru komin eftir.

Mati Murd kundi greiða teimum frá, at í fjør keyptu estlendingar ikki føroyskar vørur fyri meiri enn eina slaka millión.

Her er bara talan um fisk, men tað merkisverda er, at føroyingar selja ikki ein stert til Estland beinleiðis.

– Allur føroyski fiskurin, sum vit keyptu, fingu vit ígjøgnum danskar og íslendskar millumhandlarar, segði Mati Murd.

Hinvegin seldu estlendingar føroyingum vørur fyri 3,4 milliónir í fjør. Her var at kalla bara talan um innbúgv og aðrar vørur úr viði.

– Sostatt gott pláss at menna samvinnuna ímillum Føroyar og Danmark, helt hann.

Mati Murd gjørdi annars nógv burturúr at greiða vinnulívsfólki frá, hvussu vinnuvinarligt land, Estland er.

– Ein vinnuliv lýsing prógvar at Estland er tað mest álítandi landi í Mið- og Eysturevropa at hava samvinnu við.

Men hann segði eisini, at tað skerst ikki burtur, at tá ið tosið kemur inn á Eysturlondini og vinnulív, verður altíð spurt um mutur.

Eisini tað, hevði hann tøl fyri.

– Estland er tað landið í Mið- og Eysturevropa við minst mutri og landið er somuleiðis fremri enn nógv lond í Vesturevropa í so máta.

Hann vísti eisini til eina kanning sum vísti, at Estland er á topp 10 listanum yvir tey lond í øllum heiminum, sum hevur størst frælsi fyri fyri kapital og vinnu.

Í Estlandi eru nógvar ymsar vinnugreinar, men serliga frammaliga eru teir í kunningartøkni, í elektronisku vinnuni, í træídnaðinum og í maskinídnaðinum.

Teir hava eisini sera sterkar fíggingarstovnar og tað eru teir stóru bankarnir í Norðurlondum, sum eiga flestu týðandi bankar í Estlandi.

Hinvegin hevur fiskivinnan ikki longur so stóran týdning, sum hon hevur havt, tí at hon als ikki er týdningarleys.

Mesti fiskiskapurin er í Eystrasalti, men fiskavirki keypa eisini fisk uttanlands til virkingar.

Og Mati Murd helt, at tað var serliga á hesum øki, at føroyingar høvdu góðar møguleikar at gera seg galdandi.

Hinvegin váttaði hann eisini, at nú Estland var farið upp í ES, var umsitingin av fiskivinnuni og kvotunum løgd undir ES myndugleikar

### Lág løn og lagaligur skattur

Tað, sum hevði størstan áhugan hjá føroyskum vinnulívsfólkum, var hvussu lønarlagið var.

– Ein miðal mánaðarløn hjá einum verkafólki liggur um 2700 krónur um mánaðin, segði Mati Murdi.

Arbeiðstíðin er 40 vikur og tað er ásett við lóg.

Hann segði eisini, at felagsskatturin er 24%, men verður yvirskotið í eini fyritøku brúkt til nýggjar íløgur, er tað skattafrítt. Tað er bara, tá ið viningurin verður tikin úr landinum, at skatturin skal rindast.

Annars liggja allir aðrir skattir rættiliga væl lægri enn okkara skattir, bæði vanligi skatturin, mvg og onnur gjøld.

### Handilsferð til Baltalond

Í kjalarvørrinum á hesum kunnandi fundinum ætlar Menningarstovan seinni í ár at skipa fyri eini handilsferð til Estlands og kanska eisini til Litava.

Endamálið við ferðini er at finna vinnumøguleikar fyri føroyskar fyritøkur í hesum londum.



*Tey, sum vóru og lurtaðu eftir Mati Murd, fingu at vita, at lønin hjá einum arbeiðara á einum fiskavirki í Estlandi er 2700 krónur í miðal um mánaðin. Felagsskatturin er 24% - men bara tá ið vinningurin verður tikin úr Estlandi. Verður hann brúktur til nýggjar íløgur, er hann skattafríur*

## Krabbmeinsfelagið nýggja heimasíðu

"Eitt tap skal fram í ljósið. Tað eru tapini, sum gera okkum til menniskju. At vera nøgdur við tað, sum man hevur, er at vera ríkur"

Soleiðis ljóðar teksturin til dagin í dag á nýggju heimasíðuni hjá Føroya Felag móti krabbameini. Fert tú inn á www.krabbamein.fo, finnur tú hvønn dag ein nýggjan tekst, umframt eitt breitt úrval av dagførdum tilfari, sum uppá ymiskar mátar viðkemur krabbameini og virksemi hjá felagnum

Ert tú krabbameinssjúklingur ella avvarðandi, ella vilt tú bara vita meiri um krabbamein og annað í tí sambandi, eru hópin av hentum upplýsingum inni á nýggju heimasíðuna hjá Føroya Felag móti Krabbameini. Tú fært góð ráð um kost í sambandi við krabbamein, kanst lesa um sjálvhjálparbólkarnar undir felagnum og stóra virksemið, sum er í felagnum, umframt kunning um nógv, ið rørir seg innan krabbameinsviðgerð og -røkt.

Allar greinirnar, ið hava verið á heimasíðuni, eru savnaðar, og slóðir eru til nógvar viðkomandi heimasíður. Miðað verður eftir at hava nýggj tíðindi inni á heimasíðuni regluliga, tíðindi, ið eru viðkomandi fyri føroyingar.

Føroya Felag móti Krabbameini hevur havt heimasíðu síðan 2002 og sambært kanningum er síðan væl vitjað. Fólk, stovnar og fjølmiðlar kunnu fara inn á heimasíðuna og tekna seg at fáa tíðindabrævið. Felagið hevur eisini latið gera nýggjan faldara, ið greiðir frá virkseminum í felagnum.

Ein sjúkrarøktarfrøðingur er í fullum starvi í Føroya Felag móti Krabbameini, men av tí at virksemið hjá felagnum er økt so nógv seinastu árini, verður ein sjúkrarøktarfrøðingur settur aftrat - fyribils hálva tíð í eitt ár.

**-ave-**